# Kunngerð nr. 1 frá 6. januar 1972: Viðtøkur fyri grunn Onnu Djurhuus til áminnis um Sverra Fon.

Grunnurin er stovnaður av Onnu Djurhuus sambært testamenti hennara. Upprunaliga stovnsfæið var kr. 99.591,07.

**§ 1.** Stovnspeningurin, sum hann er og verður, verður at seta í landskassalán ella lán, landið veðheldur fyri, tó so at peningurin, ið verður at nýta eftir endamálsgreinini, verður at seta í banka ella sparikassa.

**§ 2.** Endamál grunsins er at geva út ella veita stuðul til útgávu av bókum, ið hava bókmentaligt virði.

Peningur, ið nýtast skal til bókaútgávu v.m., verður at taka av rentuinntøkunum, og, um tað er neyðugt, av tí partinum av stovnsfænum, sum nú einaferð er.

**§ 3.** Fyri grunninum situr setursráð Fróðskaparseturs Føroya.

At binda grunnin krevst undirskrift av formanni og einum limi setursráðsins.

**§ 4.** Roknskaparár grunsins er fíggjarárið.

Roknskaparnir verða grannskoðaðir av grannskoðara landsins.

**§ 5.** Um tað, sum tíðir broytast, verður so, at endamál grunsins ikki kann njóta frama, hevur setursráðið skyldu at gera neyðugar broytingar í viðtøkunum, tó so at ikki má vera gingið frá andanum í viðtøkunum.

Broytingar í viðtøkunum skulu í øllum førum hava góðkenning landsstýrisins, áðrenn tær fáa gildi.

**§ 6.** Um ivi stendst av, hvussu viðtøkurnar eru at skilja, verður ivamálið at leggja fyri landsstýrið, og er avgerð tess endalig.

**§ 7.** Viðtøkurnar verða at góðkenna av landsstýrinum.